# Röða
# forseta Íslands
# Guðna Th. Jóhannessonar
# til døgurða hjá
# borgarstjóranum í Sörvági
# Föroyum
# 15. maí 2017

Kæru bygdaráðslimir í Sörvági
- og aðrir góðir gestir!

Vit hjún takka tykkum fyri góða móttöku, nú föroyavitjan okkara er byrjað. Eliza hevur ikki verið í Föroyum áður, og eg veit, at hon hevur glett seg almikið til at njóta sjáldsama náttúruvakurleikan í Föroyum og hitta tað góða fólk, sum her býr. Sjálvur havi eg avbera góð minni frá mongum fyrri ferðum higar, fyrstu ferð sum barn við foreldrum mínum. Tá komu vit við skipi og dvaldu her nakrar dagar, áður enn vit hildu áfram heim til Íslands. Aldri gongur tað frá mær, tá ið eg sum smádrongur sá land mítt rísa úr havi í lýsingini. Mangur og ein föroyingur hevur kent somu gleði á veg heim við skipi, tá ið Föroyar aftur vóru í eygsjón við svörtum meitilbjörgum og grönum líðum.

Henda uppliving er ikki tað einasta, vit eiga í felag, vit stoltu oyggjarskeggjar í norðri. Uppruni okkara er hin sami, og öld eftir öld hava tvíburatjóðirnar báðar kent havsins og náttúrunnar mátt - í góðum eins væl og illum. Eg fari hvörki at vátta ella avsanna sögnina um, at Sörvágur ber navn eftir norröna landnámsmanninum Sörla, tó tað í fyrstu atlögu ikki tykist ósannlíkt. Sigast skal, at á íslendskum hevur Sörvágur stundum verið skrivaður *Saurvogur á Vogey*, og merkir „saur“ í hesum föri „súgv“ ella „göltur“. Var tann djarva hugsan uppi í Íslandi, at hetta hevði samband við, at fruktbærisguðurin Froyur í fornu ásatrúgv okkara var dyrkaður; men henda tulking er langt síðan slept. Sigast skal eisini, at vit vita sera lítið um svínahald í Föroyum í fornum dögum.

Tað kann eisini vera so einfalt, at fólk bóru eyga við stóran sand í vágsbotni, og góvu váginum navn eftir seyrinum, sum rann eftir hesum vakra sandi – Seyrvágur. Sum eg skilji, var upp á tal her í bygdini um miðja farnu öld

at broyta bygdarnavnið sambært hesari tulking; men tað vann ikki frama. Heima í Íslandi var um somu tíð sett fram hitt sonevnda náttúrunavnaástöðið, og fekk tað mikla umröðu. Fört var fram, at staðarnövn, sum at síggja til eru runnin av fólkanövnum – næstan altíð kallmansnövnum – í upphavi komu av náttúrufyribrigdum á staðnum, men vórðu bronglað við tíðini. Tískil vóru Sörlastaðir okkara í veruleikanum ikki nevndir eftir Sörla, sum sigldi við Þóri snepli landnámsmanni í Fnjóskadali, heldur enn henda valabygd, Sörvágur, er nevnd eftir Sörla landnámsmanni. Men í Sörvági eru funnar toftir úr landnámsöld, og er hetta næsta havn íslendinga. Tað galt um at vinna inn um Mikinesboðar, og so vóru teir her. Hvör veit, um teir Sörli í sögn tykkara og Sörli okkara ikki vóru systkinabörn?

Kæru vertir! Jú, víst eru söga og mentan föroyinga og íslendinga samantvinnaðar, og tungumál okkara eru álík, tó at eg haldi meg ikki til at bera fram alt, sum eg havi at siga, nú föroyaferð konunnar og mín er byrjað, á föroyskum. Landsmenn mínir, sum hava búð og framvegis búgva her í Föroyum, siga fyri mær, at tað tekur íslendingi nakrar fáar vikur ella mánaðir at leggja um til föroyskt. So leingi dvölja vit ikki, men gleða okkum til at kunna okkum um föroysk viðurskifti komandi dagarnar og læra föroyingar enn betur at kenna - góðu vina- og grannatjóð okkara íslendinga.